HB-VB/Sumba 3-1 (2-0):

# Avgreiðslu-mál

HB

VB/S

**HB gjørdi ikki stórvegis háva burtur úr vitjanini hjá VB/Sumba, sum varð sent suður við 1-3 tapi**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

HB var so nógv tann størsti favoritturin hetta Formulaumfarið. Og tó talan ikki gjørdist um sorl av nøkrum slag í Gundadali, so var HB-sigurin ongan tíð veruliga í vanda.

Milan Kulic legði tíðliga í dystinum HB á odda, tá Vlada Filipovic ikki helt einum innleggi úr høgru.

Restina av fyrra hálvleiki var talan um einvegis ferðslu, og við eitt sindur størri neyvleika kundi HB væl havt økt meira enn ta einu ferðina. Tá hetta varð gjørt, so var talan aftur fyri um eina sanna perlu. Sendingin frá Róki fram til Páll M. Joensen var millimeturneyv, og eftir at Páll í fyrstu atløgu stútaði á tvørtræið, fylgdi hann sjálvur upp og beindi bóltin í málið.

**Brotsspark skapti spenning**

Tað stóð fáu áskoðarunum í Gundadali greitt, at HB at kalla bert skuldi rulla sigurin heim seinastu trý korterini. Men nakað av spenningi kom kortini í. Tað vóru annars ikki nógv, sum sóu nakað brotsspark, men dómarin metti so, at Rógvi hevði hildið Birgiri Jørgensen, tá fríspark varð sent innfyri, og veteranurin var sjálvur ískaldur úr 11 metrum. Tað kundi enntá verið meira spennandi, men Birgir stóð sjálvur fyri skotum, tá hann fekk gult kort fyri eitt gjøgnumbrot, har tey flestu hildu, at Birgir var maðurin, sum varð hildin.

Og tá so 3-1 málið kom, punkteraði fullkomuliga. Verjuspælari bjargaði annars fyrstu royndini á strikuni, men Rógvi Jacobsen var skjótur á returinum.

Seinastu løtuna kundi sigurin væl verið størri. Gestirnir megnaðu sjáldan at spæla seg fram um miðstrikuna, men eins og fyri steðgin, so var neyvleikin ikki til staðar hjá lopngu sigursvísu HB'arunum.

Og alt í alt, so mundu teir ikki leggja so nógv í hetta. Teir gjørdu arbeiðið, sum skuldi til, og vunnu sær neyðugu stigini. Tey lyftu liðið upp á triðja plássið á stigatalvuni, og so er árið spakuliga farið at líkjast nøkrum hjá verjandi meistarunum.



*Talan var um lætta uppgávu, tá HB á heimavølli tók móti VB/Sumba*

*savnsmynd*




Les Sosialin so ert tú við


# KROSSORÐ




## Vinnari:

*Bjørg Petersen*
*á Fløtum*
*180 Kaldbak*

## Loysnin frá seinastu viku
## Loysunarorðið: APUKATTAVESIN

| | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| A | P | O | S | T | L | A | R | | K | A | T | U | S | J | A |
| M | I | S | S | I | O | N | E | R | A | R | | N | I | C | |
| B | S | A | | A | G | G | U | S | T | E | I | N | U | S | |
| A | S | K | | N | | E | T | | T | N | | A | M | | E |
| S | A | A | B | | O | L | E | | E | D | I | | U | L | V |
| S | R | | A | L | N | I | R | | G | A | L | A | T | E | A |
| A | | S | K | I | | K | | K | A | L | L | I | | N | N |
| D | A | L | A | R | N | A | R | | T | | | R | O | N | G |
| Ø | N | I | R | | Ó | | Ø | T | | T | O | B | B | I | E |
| R | I | T | I | N | G | | S | Ó | P | A | | A | A | | L |
| U | | N | N | | V | I | K | T | O | R | | G | N | | I |
| R | E | A | | K | A | I | | A | L | I | N | | | E | U |
| 501 | L | | K | O | | | O | | I | | | E | | I | M |
| G | E | N | E | R | A | L | K | O | N | S | U | L | A | T | |
| A | G | E | N | T | U | R | | S | | E | I | N | G | I | L |
| V | I | G | D | I | S | | Ó | T | A | N | G | A | | L | A |

## Hvønn fríggjadag

er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn – og viðmerkið »Krossorðagáta nr. …« á bjálvan.

**502**

Loysunarorðið: ..............................................

Navn: ..............................................

Bústaður: ..............................................

Bygd/býur: ..............................................

***Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!***

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- ☐ **Okkara kokkar** – *Gudmund Gudmundsson*
- ☐ **Grund 1** – *Steinbjørn B. Jacobsen*
- ☐ **Ein farri av kolvetni** – *Marjun Kjelnes*
- ☐ **Veður og tíðindi í Føroyum 1875–2002** – *Petur Skeel Jacobsen og Finnbogi Ísakson*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- ☐ **Heimsatlas**
- ☐ **Føroysk Flora** – *Jóhannes Jóhansen*
- ☐ **Havið** – *Bogi Hansen*
- ☐ **Heimsins lond**
- ☐ **Grót og steinar** – *Martin Heinesen týddi*

***Bøkur og annað tilfar***
***– bæði innan og uttan skúlagátt***